Vegleiðing um smittusjúkur

Barnaormur

Smáir ormar, sum liva í tarminum. Eggini eru sera mótstøðufør og kunnu liva leingi í seingjarklæðum og støvi. Ormarnir geva skriða kring endatarmsopið.

Smittar frá tveimum vikum eftir, at barnið er smittað, og til viðgerðin er byrjað.

Barnaormur skal viðgerast við heilivági. Alt húskið eigur at fara í viðgerð samstundis.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla uttan avmarkingar.

Barnasár

Sár, sum standast av bakterium, og tey smitta sera illa. Sárini eru lítlir, reyðir blettir, sum skjótt verða til vætandi sár, sum fáa gulligar skruvur. Sárini kunnu vera allastaðni á húðini, men eru ofta rundan um nøsina og munnin á barninum.

Smitta kann fara fram, tá tað vætir úr sárinum og so leingi, sum skruva er á. Smittan kann vera í umhvørvinum ógvuliga leingi.

Barnasár skal viðgerast við heilivági.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá sárini eru turr, og skruvurnar eru burtur.

Beinkrím

Beinkrím (influensa) stendst av ymsum virusum. Barnið kann hava fepur, høvuðpínu, vøddapínu og kann kenna møði. Ofta snorar barnið eisini og hevur ilt í hálsinum.

Smittar frá degnum fyri, at barnið gerst sjúkt og í 3-4 dagar. Smittar gjøgnum snor og spýtt, so halt gott handreinføri.

Børn, ið annars eru frísk, hava ikki tørv á viðgerð við heilivági fyri beinkrím.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá eingin fepur er, og tá barnið megnar at luttaka í spæli og virksemi uttan serliga umsorgan.

Eygnabruni

Eygnabruni kann vera antin mildur ella ringur. Mildur eygnabruni gevur reyð eygu og eitt sindur av pussi í eygnakrókunum. Ringur eygnabruni gevur reyð og hovin eygu, puss rennur úr og tað svíður í eygunum.

Ringur eygnabruni smittar í tíðarskeiðnum, tá puss rennur úr eygunum.

Vanliga er neyðugt at viðgera ringan eygnabruna. Neyðugt er ikki at viðgera mildan eygnabruna.

Barn við ringum eygnabruna kann fara á stovn ella í skúla aftur, tá tað hevur verið í viðgerð í minsta lagi í tveir dagar, og øll sjúkutekin eru burtur. Barn við mildum eygnabruna kann fara á stovn ella í skúla uttan avmarkingar.

Fimta barnasjúka

Mild virussjúka, sum elvir til reyðar kjálkar hjá barninum (lussingesyge) og síðani útbrot á húðini. Útbrotið varir einar tveir dagar, men kann vísa seg aftur komandi tíðina. Kvinnur, ið eru við barn og hava verið í smittuvanda, eiga at verða kannaðar nærri.

Smittutíðarskeiðið er uml. ein vika eftir smittu, og til útbrotið vísir seg á húðini.

Eingin viðgerð er fyri fimtu barnasjúku.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá tað er frískt.

Hond- fót- munnsjúka

Virussjúka við útbroti í munninum og serliga á hondum og fótum. Talan er um smáar, reyðar blettir, sum broytast til vætufyltar bløðrur. Barnið kann vera illa fyri og hava eitt vet av fepri.

Smitta fer fram, meðan útbrot er á húðini. Sjúkan er aloftast av eftir umleið eini viku.

Eingin viðgerð er fyri sjúkuna.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá tað er frískt.

Krím

Kann standast av nógvum ymsum virusum. Barnið kann snora, njósa, hava ilt í hálsinum og møguliga eitt vet av fepri. Serliga smærri børn hava ofta krím (forkølilsi).

Smittar frá samdøgrinum áðrenn barnið fær krím og í uml. eina viku.

Eingin viðgerð verður givin fyri krím. Halt gott handreinføri fyri at minka um smittuvandan.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá eingin fepur er, og tá barnið megnar at luttaka í spæli og virksemi uttan serliga umsorgan.

Leyst lív og spýggja

Kann koma av infektión við virusi, bakterium ella snultarum (parasittum). Ofta hevur barnið eisini ógvuliga ilt í búkinum.

Smittar beinanvegin, sum barnið fær leyst lív ella byrjar at spýggja. Smittar gjøgnum skarn og spýggju á hondum ella lutum.

Vanliga verður eingin viðgerð givin fyri leyst lív og spýggju. Tosa við lækna, um tilburðirnir rúgvast upp.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá tað er frískt, og skarnið er vanligt aftur.

Lús

Smákykt, sum livir í hárbotninum á fólki. Tað skriðar illa í hárbotninum, tá tú hevur lús. Smitta fer fram við beinleiðis sambandi ella á lutum so sum eini bust ella húgvu.

Smittar frá tí at barnið hevur fingið lús, til eingin livandi lús er eftir í hárinum.

Viðgerðin er at kemba javnan við lúsakambi. Til ber at brúka lúsasjampo umframt.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla, tá viðgerðin er byrjað.

Skáldkoppar

Virus, sum elvir til reyðar blettir á húðini, sum verða til smáar, vætufyltar bløðrur, sum bresta, og skruva kemur á sárið. Skáldkoppar smitta illa. Barnið kann vera illa fyri, hava fepur og oftast kemur nógvur skriði.

Barnið smittar frá sjey døgum eftir smittu til fimm dagar eftir útbrotið, ella til ongar nýggjar bløðrur eru komnar í tveir dagar, og skruvurnar eru turrar.

Vanliga verður eingin viðgerð givin fyri skáldkoppar.

Tá skruvurnar eru turrar, er smittuvandin av, og barnið kann fara á stovn ella í skúla.

Skrubb

Húðsjúka, sum stendst av skrubbmottum. Sjúkan vísir seg við skriða og ofta eisini smáum, vætufyltum, reydligum bløðrum.

Stutt eftir at barnið er smittað, kann tað smitta onnur. Barnið smittar til 8-12 tímar eftir, at viðgerðin er byrjað.

Skrubb skal viðgerast við kremi. Alt húskið eigur at fara í viðgerð samstundis.

Barnið kann fara á stovn ella í skúla 12 tímar eftir, at viðgerðin er byrjað.

Heilsustýrið